# Tað eydnaðist ótrúliga væl

**Umstøðurnar eru frálíkar, fólkið er blítt og maturin er góður, so betri kundi tað ikki vera, sigur borgarstjórin í Gøtu**

SMYRIL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Mikudagin helt bygdaráðið í Gøtu ein sera vælеydnaðan arbeiðsfund í snotiligu fundarhølunum umborð á Smyrli Frá vinstru sita Hans Mourits Foldbo, Poula J. Gregersen, varaborgarstjóri, Måns Pers son, kommunuskrivari, Páll Isholm, borgarstjóri, Óli í Búrstovu, fíggjarleiðari hjá kommununi, Steintór Jacobsen, Maud Poulsen, Oluffa Joensen og Svenn Ó. Olsen*

Nýggi Smyril er sum eitt hotell!

Tað ásannar borgarstjórin í Gøtu, Páll Isholm.

Mikudagin tók bygdaráðið í Gøtu tað óvanliga stig at fara umborð á n‡ggja Smyril at halda fund.

Bygdaráðið stríðist í hesum døgum við at leggja fíggjarætlanina fyri komandi ár og tá plaga tey at fara burtur onkustaðni ein heilan dag fyri at fáa arbeiðsnáðir.

– Hesuferð kom skrivarin hjá okkum við tí frálíka hugskoti at í ár skuldi hesin arbeiðsfundurin haldast umborð á Smyrli og tað varð rættiliga væl móttikið beinanvegin, sigur Páll Isholm.

– Smyril er nýggjur og vit vildu fegin royna hendan nýggja møguleikan og tað hepnaðist stak væl.

### Vildu vita um hald var í reypinum

– Vit vildu hava at vita, um hald var í øllum reypinum, sum vit hava hoyrt um nýggja Smyril, heldur Páll Isholm skemtandi fyri.

Og tað ásannar hann beinanvegin, at tað var tað, tí hetta var sum at vera á hotelli.

– Umstøðurnar umborð at halda funder frálíkar, manningin er blíð og maturin var sera góður, so tað kundi valla verið betri, sigur hann.

Hann sigur, at tey fóru umborð mikumorgunin klokkan gott níggju, tá ið Smyril var komin til Havnar úr Suðuroy.

– Vit fingu fyrst morgunmat umborð. Á miðdegi fingu vit døgverða og áðrenn vit fóru í land, fingu vit smurt breyð. Kaffi og kakur høvdu vit allan dagin.

Umborð á Smyrli eru frálík fundarhøli við øllum hentleikum, so tað var als ongin trupulleiki og hetta var eitt tiltak, sum allir bygdaráðslimirnir vóru stak væl nøgdur við.

Verri varð tað ikki at, at sambandið við fartelefonina rýkur heilt skjótt, tá ið farið er av Havnini, so arbeiðsfriðurin er fullkomin.

– Hetta letur seg væl gera, tí tað var ein fragd at royna nýggja Smyril.

### Tølini komu á fíggjarætlanina

Borgarstjórin í Gøtu ásannar eisini, at tað kom heilt nógv burturúr hesum arbeiðsfundinum umborð á Smyrli og tey flestu tølini eru sett á fíggjarætlanina.

Spurningurin er so, hvat gøtufólk kunnu vænta næsta ár.

Eitt nú ætlar bygdaráðið at seta tvær milliónir av til nýggj grundstykki næsta ár.

– Vit útstykkjaðu 13 grundstykki í fjør, men tað standa eini 30 fólk á bíðilista. Sostatt er stórur tørvur á grundstykkjum í kommununi so har royna vit at bøta um støðuna.

Á fíggjarætlanini komandi ár, fer bygdaráðið annars at leggja dent á vinnuøki, vetrarfriðing, ferðslutrygd og á at fyrireika eina nýggja vøggustovu. Men størsta einstaka útbyggingin næsta ár verður at gera vinnuøkið í Gøtudali klárt.

# Stórur áhugi fyri at leiga høli umborð á nýggja Smyrli

**Tað er stórur áhugi fyri at leiga høli umborð á nýggja Smyrli til fundir og ráðstevnur og umstøðurnar umborð eru frálíkar til slíkt virksemi**

SMYRIL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Virki og stovnar í Føroyum hava nú fingið ein nýggjan møguleika at samantvinna arbeiðið og sosiala samveru.

Tað hava tey fingið við tað, at nýggi Smyril er komin til landið.

Umborð á Smyril eru frálíkar møguleikar at halda fundir og ráðstevnur og ReginVágadal, rakstrarleiðari hjá Strandferðsluni, sigur, at hetta er ein møguleiki, sum nógv virki og nógvir stovnar hava fingið eyga á.

– Hølini umborð eru rættiliga nógv umbiðin til fundir og ráðstevnur umborð, sigur hann.

Hann sigur, at talan er bæði um privat virki og almennar stovnar.

Aðrastaðni í blaðnum í dag, ber soleiðis til at lesa, at Gøtu Bygdaráð hevur hildið arbeiðsfund umborð á Smyrli og allar kommunurnar í Suðuroy høvdu eisini fund umborð á Smyrli longu tann fyrsta túrin, hann sigldi.

### Fleiri møguleikar

ReginVágadal sigur, at umborð er eitt vælútgjørt fundarhøli til 14 fólk við video-kanón, talvu og stikkum til alnetið.

Samstundis eru eini buffet-høli við plássi til 56 fólk til taks.

Sostatt eru tað mong, sum brúka hetta høvi til at halda fundir, samstundis sum tey kunnu bíleggja mat umborð.

Ein slíkur arbeiðsfundur ella ein ráðstevna umborð á Smyrli, kann so samantvinnast við eini útferð í Suðuroy og regin Váfgadal sigur, at hetta er ein møguleiki, sum fleiri taka av.

Hinvegin sigur Andrass Jensen, ferðafólkaleiðari hjá Strandferðsluni, at enn hevur Strandferðslan ikki kunna staðfest nakað ferðslulop eftir at n‡ggi Smyril er farin í sigling.

– Ferðafólkataliðer ikki økt, sigur hann.

Hann heldur kortini, at tað er árstíðin sum ger tað og at ferðafólkastreymurin ímillum Suðuroy og Havnina fer at økjast ímóti sumri

# Smyril livir upp til vónirnar

**Nú vit hava roynt nýggja Smyril í ringum veðri kunnu vit ikki siga annað enn at hann livir upp til tað, vit vónaðu, sigur Skiparin**

NÝGGI SMYRIL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Nú hava vit roynt Smyril í ringum veðri og vit kunnu róliga siga, at hann livir upp til vónirnar, sigur Pauli Larsen, skipari*

– Nýggi Smyril er eitt sera gott sjóskip.

Tað staðfestir skiparin, Pauli Lassen.

Nú Smyril hevur siglt í hálvaaðru viku, hava vit spurt skiparan um hann livir upp til tær bjørtu vónirnar, vit øll høvdu til skipið.

Skiparin heldur, at tað kunnu vit róliga siga, at hann hevur hann gjørt.

Serliga um vikuskiftið var sera vánaligt veður, men hann var rættiliga góður at sigla við.

Tá ið Smyril fór úr Suðuroy, norður til Havnar fríggjakvøldið var stormur av landnyrðingi norði, sum er rættiliga ring ætt at sigla norður í. Samstundis var krappsjógvað og stórar aldur.

Pauli Larsen sigur, at aldurnar mundu vera einar átta metrar.

Hann sigur, at ongin ivi er um, at um vikuskiftið hevði gamli Smyril farið vesturum Sandoynna onkrar túrar, men tað var heilt óneyðugt við hesum

– Men hann fer ómetaliga væl við sær í sjónum. Forskipið er so slankt, at hann trampar ikki so illa, men fer ógvuliga róliga í sjónum.

Men hann er eisini góður inn á síðuna og undan, so hann roynist sera væl allar vegir.

Hann sigur, at í ølum vanligum veðri verður ikki neyðugt at fara vestanfyri Sandoynna í hesum Smyrlinum, men tað kunnu kortini vera óveðursdagar, har tann leiðin verður vald, fyri at gera tað behagiligari hjá ferðafólkinum

### Máldu 46 metrar um sekundið

Fríggjakvøldið var so nógvur vindur, at skiparin helt ikki, at tað var ráðiligt at fara inn á Havnina og tí fór hann inn á Runavík.

Eisini sunnukvøldið var rokstormur av vestri og tá máldi vindmátarin umborð 46 metrar um sekundið. Men heldur ikki tað bilti tað allarminsta.

Nú kann tað vera stórur munur á, hvussu garvað sjófólk og vanligir landkrabbar, meta um veður og rull.

Men ferðafólk, sum vóru við um vikuskftið, vátta tað, sum skiparin sigur, at skipið rullaði altso ikki nakað serligt.

Leygarmorgunin hendi so tað, at bylgjubrótarin á bakkanum boygnaði. Hann var útnyrðingur norðan, men tað var landnyrðingsalda og krappsjógvað, so líkindini vóru vánalig.

Men umborð er semja um, at hann var ov veikur, tí boygnaði hann.

–Veðrið, sum var um vikuskiftið, eigur hann at tola, so hann hevur ikki verið nóg sterkur, sigur skiparin.

Skiparin ásannar kortini, at hóast skipið roynist sera væl, hava ymsir tekniskir trupulleikar verið. Men talan er ikki um álvarslig brek og hetta eru ikki trupulleikar, sum nerva ferðafólkið, í hvussu so er ikki nakað størvegis.

Skiparin sigur, at so hvørt, teir fáa vant seg við skipið, gongst eisini betri og betri at leggja at.